## Umsókn í Altinginum

Í Íslandi hevur Altingið nú fingið uppskotið frá stjórnini um at taka upp samráðingar við ES fyri at kanna møguleikarnar og treytirnar fyri limaskapi í samveldinum. Ein talsmaður fyri stjórnina segði í gjár, at ætlanin er at fáa Altingið at umrøða uppskotið í morgin ella hósdagin, og at tað verður endaliga samtykt har um nakrar vikur. Jóhanna Sigurðardóttur, forsætisráðharri, hevur fyrr sagt, at tekur Altingið undir við uppskotinum um samráðingar, kann stjórnin senda umsóknina til Bruxelles eina ferð tíðliga í juli. Teir báðir samgonguflokkarnir hava avtalað, at úrslitið av samráðingunum við ES skal leggjast út til fólkaatkvøðu.



## Heilsucafé í Runavík

Í samband við Rørsluárið 2009 varð Eysturoyar Røktar-og ellisheim leygardagin karmur um eitt heilsuátak .Tað vóru Heilsumálaráðið og Runavíkar kommuna ið skipaðu fyri. Klokkan 14 bjóðaði Sæunn Ólavsdóttir Hansen, varaborgarstjóri vælkomin, og Jóannes S. Hansen settist handan klaverið og spældi nøkur løg. Síðan helt Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður fyrilestur um heilsupolitisk tiltøk, og Tordur J. Niclasen hugleiddi um rørslu og týdningin av henni. Køkurin hevði syrgt fyri einum sera spennandi borðhaldi við alskyns heilsugóðum kosti. Klokkan 16 varð farið gongutúr eftir nýggju gøtun niðan Toftavatn.





# Tummil upp fyri ORKA og HOGNI

**Ársins SPOT festivalur í Århus er júst farin aftur um bak. Føroysk umboð vóru ORKA, HOGNI og Valravn. Fyrstnevndu fingu føgur orð frá donsku ummælarunum, meðan Valravn ikki sannførdi ummælaran hjá Rootszone**

TÓNLEIKUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Undanfarna vika var á tremur við tónleiki, tá árligi SPOT festivalurin fylti býin. Við á festivalinum vóru føroysku ORKA og HOGNI. Gaffa ummælarin, Sara Bindeballe hevði gjørt sær ómak við ummælinum av ORKA, og var so mikið hugtikin av tónleikinum, at hon gav bólkinum fimm av seks møguligum stjørnum fyri konsertina. Leysliga týtt sigur ummælarin nakað soleiðis: "At traðka inn í rúmið, tá ORKA framførdi sítt fyrsta lag, er sum at traðka inn í eitt inferno av ljóði. (...) Sentralt stendur vokalurin hjá Eivør Pálsdóttir. Hon dominerar ikki, onkuntíð sker hon ov nógv í gjøgnum, og til tíðir druknar hon í larminum, men fyri tað mesta er hon akkurát sum hon skal, og vevur dragandi kring tungu beat'ini. Í fyrstu sangunum manar rødd Eivarar og føroysku tekstirnir fram eitt norðurlendskt og næstan miðaldarligt huglag av frostklárum náttum, vetrarmarkir og saga'ir."

Ummælarin heldur fram og sigur, at hon er hugtikin av ljóðførunum, og flokkar ORKA í bólk saman við Tom Waits. Hon rósar konsertini fyri at vera so umskiftilig, at forvitnið hjá lurtaranum verður varðveitt alla konsertina. At enda fegnast ummælarin um at hoyra so góðan tónleik á øðrum máli enn enskum, og gevur ORKA fimm av seks stjørnum fyri avrikið.

### Manisk HOGNI

HOGNI, eisini kendur sum Høgni Lisberg, fær eisini vøkur orð á vegnum. Ummælari frá Rootszone var til staðar, tá HOGNI spældi sína konsert á midnátt fríggjakvøldið á Archaus pallinum. Hann sigur nakað soleiðis um konsertina hjá Høgna Lisberg. "Við síni manisku karisma var HOGNI í sentrum, og saman við einum supertight trummara og einum bassspælara, sum heldur vil spæla gittar, vísti HOGNI at hóast lága íbúgvaratalið í Føroyum, kunnu føroyskir tónleikarar levera tað besta innan allar hugsandi sjangrur."

Ummælarin kendi nakað til Valravn við føroysku Onnu Katrin Egilstrøð á odda. Ummælarin var ikki so imponeraður av bólkinum, sum onkuntíð fyrr, og helt at ein skrá uppá 45 minuttir var nakað tøtt til Valravn.